# KOM OG SET TEG HER

© Anders Bøgelund




Vilt tú við lið mína sita,
so skal eg troysta teg.
Á, lat meg vita,
hvat sum ger tær fortreð.

Vilt tú hjá mær vera,
so vil eg kroysta teg.
Hvat stuttligt er at gera,
hvat spæl kenna tú og eg.

Legg tína hond í mína.
Brátt allur dagurin lær.
Eg kann teg fevna og kína,
ganda smíl fram í tær.

## Spælið

### Bygnaður

[ intro | A | A | A | outro ]

### Tilfar

Silkiturrikløð

### Tilrættaleggjan

Børnini verða býtt í tveir bólkar, og øll fáa hvør sítt silkiturriklæði.Venjið spegldans yvir av hvør øðrum, so at børnini læra, hvat spegldansur er.

Betri vinir
Fri for Mobberi

**Spælið**

Silkiturriklæðaballett/spegldansur.

Hvørt barnið heldur í einum silkiturriklæði. Annar bólkurin byrjar sum áskoðarar. Hin bólkurin er úti á gólvinum.

| | **Sangtekstur:** | **Soleiðis gera tit:** |
|---|---|---|
| Intro | | Børnini, sum eru úti á gólvinum, sita í skraddarastøðu. Tá ið tónleikurin fer í gongd, næla tey sum blómur við róligum rørslum og gera flótandi rørslur við turriklæðnum. |
| A | *"Vilt tú við lið mína sita…"* | Børnini renna runt úti á gólvinum og gera rørslur við turriklæðnum og dansa eina ballett fyri áskoðarunum. Tá ið ørindið er liðugt, renna tey øll yvir til áskoðararnar og geva teimum turrikløðini. |
| A | *"Vilt tú hjá mær vera..."* | Nú skal hin bólkurin dansa eina turriklæðaballett fyri sínum áskoðarum. Tá ið ørindið er liðugt, bjóðar hvørt barnið einum áskoðara út á gólvið til eina felags ballett. |
| A | *"Legg tína hond í mína..."* | Børnini standa tvey og tvey yvir av hvørt øðrum og enda dansin við at leggja turrikløðini á høvdið á báðum. |

**Valmøguleikar**

- ★ Børnini verða býtt upp í tvey, eina helvtin eru áskoðarar, hin helvtin dansar á gólvinum. Tit kunnu skifta, so hvørt eitt vers í sanginum endar.
- ★ Børnini seta seg tætt saman á gólvinum. Tit skulu nú gera eina holu. Tit kunnu nýta ein fallskíggja ella eitt lak, sum tit koyra yvir børnini. Í holuni kunnu tit hava ein bamsuvin við, so tit kunnu syngja fyri honum. Meðan tit syngja, gera tit smáar rørslur við fallskíggjanum, so hann fer upp og niður, og tit merkja vind koma inn í holuna. Um tit lata fallskíggjan nerta við hárið, síggja tit hárið standa í andarisi, tá fallskíggin fer upp aftur.
- ★ Sangurin er friðarligur og kann nýtast sum ein troystarsangur ella hvíldasangur.

Betri vinir
Fri for Mobberi